**Handilsskúlin**

**Lærugreinakunngerð** **November 2002**

# *Mentanarfatan C*

*Endamálið*

**1.** Endamálið er, at næmingurin fær kunnleika um ymiskar fatanir av mentanarhugtakinum og samstundis mennir fatanina av egnari mentan. Hann skal kunna eyðmerkja og seta ymisk mentanarlig fyribrigdi í eitt breiðari høpi, greiða frá og greina mentanina í einum avmarknaðum umráði, umframt at menna evnini at samskifta tvørtur um mentanarlig mørk.

*Undirvísingin*

**2.1** Í undirvísingini verður arbeitt við fimm evnum, sum eru nærri lýst í **3.2** - **3.6**. Mentanarhugtakið kann lesast sum sjálvstøðugt evni, men kann eisini lesast saman við tveimum av hinum evnunum. Í minsta lagi í tveimum evnum skulu mentanarlig viðurskifti uttanfyri vesturlendsku mentanina takast við.

**2. 2** Undirvíst verður í mentan í breiðari merking og dentur verður lagdur á mentanarsambond.

**2.3** Í undirvísingini skulu dagsins mál takast við.

**2.4** KT er partur av undirvísingini.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1** Í sambandi við høvuðstættirnar, ið nevndir eru niðanfyri, verða lisnar einar 300 síður.

**3.2 Mentanarhugtakið**
Mentanarhugtakið skal leggjast fram og ymiskar allýsingar skulu viðgerast. Hugtøk sum eindarmentan, submentan og mentanarsamanrenning verða viðgjørd.

**3.3 Føroyskur samleiki**
Arbeiðast skal við føroyskum samleika og føroyskari sjálvsfatan. Føroysk mentan verður viðgjørd við dømum úr mentanarsøguni.

**3.4 Mentan og menning**
Menningin og broytingin í evropeisku mentanarsøguni verður viðgjørd innan evni sum t.d. kropsfatan, klæðir, byggilist, málningalist og tónleik.

*Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta-, og kirkjumál*
MENTAMÁLARÁÐIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMS@MMS.FO

**3.5 Tvørmentanarlig samanbering**
Í minsta lagi tvey mentanarlig evni verða viðgjørd tvørmentanarligt. Arbeitt verður við tveimum ymiskum fatanum av t.d. arbeiði, tíð, familju, einstaklingi og samfelagi, sál og kroppi ella búskapi og handli.

**3.6 Mentanarøki**
Eitt umráði, ið er avmarkað t.d. landafrøðiliga, búskaparliga ella politiskt, verður viðgjørt.

*Próvtøkan*

**4.** Hildin verður ein munnlig próvtøka.

**5.1.** Fyri næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, er próvtøkupensum umleið 200 síður, har øll evnini, sum eru nevnd í **3.2.-3.6.**, eru umboðað.

**5.2** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**5.3.** Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring í lisnum og í ókendum tilfari. Próvtakarin fær umleið 40 minuttir til fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**5.4** Próvtakarin fær ein próvtøkuspurning, sum er býttur sundur í undirspurningar.

**5.5** Til próvtøkuna eru hesir hjálparmiðlar loyvdir:
Í fyrireikingartíðini: tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, bøkur og annað tilfar, sum stendur í pensumuppgevingunum. Harumframt egnar uppskriftir.
Undir próvhoyring er tað loyvt próvtakaranum at styðja seg til próvtøkuspurningin og tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, umframt til uppskriftir gjørdar í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplestur telur ikki uppeftir í dømingini.

**5.6** Í dømingini av avriki próvtakarans verður dentur lagdur á, at hann vísir hollan kunnleika til høvuðsøkini í lærugreinini og nýtir tey hugtøk, ið eru knýtt at henni.

**6.** Givið verður 1 próvtal fyri munnliga avrikið við støði í einari heldarmeting.


MENTAMÁLARÁÐIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMS@MMS.FO